# Avloysaraskipið hjá Smyrli er nú funnið

*– Skipasýnið hevur nú góðkent skipið og í dag fer manning hjá Strandferðsluni til Onglands eftir tí. Hetta var eisini í allar síðstu løtu, sigur Strandferðslan*



*Tað er nú greitt, at hetta verður skipið, sum skal sigla fyri Smyril ímeðan hann er á beding í summar. Skipasýnið hevur góðkent tað og í dag fer manning hjá Strandferðsluni eftir tí, har tað liggur í Liverpool í Onglandi.*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú er tað endiliga greitt, hvat skip skal avloysa Smyril í rutusiglingini ímillum Suðuroynna og Havnina, í meðan Smyril er á beding á Skála.

Talan er um ensku ferjuna, „Claymore“, sum stóra, enska felagið, P&O eigur. Men hetta var eisini avgjørt í allar seinastu løtu at tað eydnaðist at finna eitt skip, tí tað er longu mánadagin, at Smyril fer á beding.

Tað eru nakrir dagar síðani, at Strandferðslan fekk eyga á „Claymore“ og síðani hava nógv fólk, bæði hjá Strandferðsluni, hjá P&O og skipsmeklarar fyri at fáa leigusáttmálan í lag.

Nú er tað komið hartil, at Skipasýnið hevur góðkent skipið og í gjár varð arbeitt við at leggja seinastu hond á ein leigusáttmála.

Men Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, væntaði ikki, at hetta fór at verða nakar trupulleiki.

Tíðliga í gjár var longu avgjørt, at einir 10-11 mans hjá Strandferðsluni skuldi fara til Onglands í dag eftir „Claymore“, og sigla hana til Føroyar, her hon verður sett í rutusigling mánamorgunin.

Leigusáttmálin er komin so mikið langt undir land, at onglendingar eru longu farnir at fyrireika fráferðina.

Motorarnir eru við at verða settir ígongd og stólar og annað er fingið umborð.

### 300 fólk og 50 bilar

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at hetta var einasti møguleiki yvirhøvur, at fáa eitt brúkiligt avloysaraskip fyri Smyril.

Skip, sum hava verið nógv betri hóskandi enn „Claymore“ hava staðið Strandferðsluni í boði, men tað hevur ikki borið til at tikið av tilboðunum, tí Strandferðslan hevur ikki havt nóg mikið av peningi at arbeitt við.

Og tað er ikki fyrrenn beint nú, at tingið hevur játtað Strandferðsluni meiri pening, hóast stovnurin gjørdi vart við trupulleikan fyri meiri enn hálvum ári síðani.

Men Reidar Nónfjall heldur, at “Claymore“ er eitt brúkiligt avloysaraskip, hóast tað langt í frá er so væl hóskandi, sum onnur skip, ið tað hevði borið til at fingið, um tingið hevði havt játtað peningin fyrr.

– Eg hugsi mest um, hvørjar avleiðingar, tað hevði havt, um vit ikki fingu hetta skipið. Og tað er púra greitt, at fingu vit ikki hetta skipið bleiv onki avloysaraskip fyri Smyril yvirhøvur, og tað hevði ein vanmlukka fyri Suðuroyingar.

Umboð fyri Strandferðsluna hava verið í Liverpool og hugt kannað ferjuna og tey lata bara væl at sum so.

–“Claymore“ er í góðum standi og er væl hildin í allar mátar.

Tað siglsti inntil fyri einum mánaða síðani.

Men tað er væl minni enn Smyril. Tað tekur 300 fólk og 50 persónbilar, ella sjey treylarar uppá átta metrar hvør.

Talan er sostatt um eitt kombinerað ferðamanna- og farmaskip.

„Claymore er 78 metrar langt og tað siglur 14 míl.

Tvs, at tað hevur hálvan triðja tíma um ferðina ímillum Tvøroyri og Havnina.

Men tað er 18 metrar breitt og er sostatt tveir metrar breiðari enn Smyril.

– Samstundis hevur tað stabilisatorar, so tað er ikki eitt skip, sum rullar illa, sigur Reidar Nónfjall.

Til samanberingar kann nevnast, at Smyril tekur 110 bilar og yvir 600 ferðafólk.

Hinvegin tekur Dúgvan bara 38 bilar, ella 5-6 treylarar. Men afturfyri tekur hon 352 ferðafólk, og tað eru 52 fleiri enn „Claymore“.

---

*Stjórin á Strandferðsluni góðar vónir:*

# Fer at ganga við lagaligheit

*– Ímeðan Smyril er á beding, verður tað ikki altíð, at fólk fara at sleppa at ferðast ímillum Suðuroy og Havnina, tá ið tey hava ætlað sær, sigur Reidar Nónfjall*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Eg vænti ikki ruðuleika.

– Men ivaleyst verður okkurt, sum verður fólki til forargilsi.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, heldur, at tað fer at fer at ganga, at hava „Claymore“ í rutusigling ímillum Havnina og Suðuroynna, ímeðan Smyril er á beding í einar seks vikur.

Hann sigur, at hóast Claymore er væl minni enn Smyril, skuldi hann nøkta tørvin á Suðuroyarleiðini.

Men hann sigur eisini, at skal tað ganga, skal eitt sindur av lagaligheit til.

Eitt nú ivast hann ikki í, at tað verður onkuntíð, at tað ikki fer at bera til hjá fólki at sleppa aftur og fram akkurát tann túrin tey hava ætlað.

Hann sigur, at tað er avgjørt, at „Claymore“ skal sigla tvær ferðir um dagin, hvønn dag í viku.

–Sostatt fáa vit flutt 600 ferðafólk og 100 bilar um Suðuroyarfjørð um dagin og tað eigur at nøkta tørvin yvirhøvur.

Hann sigur, at vanliga eru ikki meiri enn 250-300 fólk við Smyrli eitt fríggjakvøld ella eitt sunnukvøld, so vanliga skuldi tað borið til við Claymore.

Hinvegin sær hann ikki ljóst uppá møguleikan at sigla ein triðja túr um náttina.Tað fer at krevja eina heilt aðra tilrættislegging, tí tá skal so ómetaliga nógv annað í sving afturat.

Spurningurin verður, hvat vit gera, tá í okkurt serligt er á vási, sum fer at bera í sær, at nógv fólk skal ferðast.

Tað kann verða ein stevna, ein ítróttarhending, ella okkurt annað.

Eitt nú hevur verið ætlanin, at hornorkesturstevna, skal verða í Suðuroy, eitt av næstu vikuskiftunum og tað verður bæði Norðyarstevna og aðrar stevnur við, ímeðan Smyril er á beding.

– Tá mugu vit bara vóna, at fólk vilja laga seg til tær broyttu umstøðurnar og at tey spjaða seg eitt sindur út á fleiri túrar, so at ikki øll fara ísenn.

– Eitt nú kann hugsast, at summi fara hóskvøld og gista eina nátt eyka, og onnur fara fríggjamorgun, ístaðin fyri at øll troka seg saman um túrin fríggjakvøld.

Hinvegin ætlar Strandferðslan at gera, hvat hon kann fyri at Smyril skal verða tøkur aftur á Jóanøku, seinast í juni.

### Raðfestast høgt

Strandferðslustjórin heldur, at tann stóri spurningurin verður, hvussu „Claymore“ fer at klára at flyta allan tann nógva farmin, sum er at flyta ímillum Suðuroynna og Havnina.

–Í fyrsta lagi mugu vit vóna, at fólk fara at aftra seg við at taka bilin við, so at tað verður minni at føra av teirri orsøk.

– Men harafturat mugu vit so umhugsa at lýsa nakrar túrar at vera farmatúrar burturav, so at fólk vita, at í hvussu so er teir túrarnar skulu tey ikki vænta at fáa bilin við sær.

Hann hugsar fyrst og fremst um túrin av Tvøroyri til Havnar hóskvøld, tá ið tað er nógvur fiskur við, sum skal til Danmarkar við Norrønu.

Í øllum førum er tørvurin hjá vinnulívinum eitt mál, sum vit fara at raðfesta høgt, sigur strandferðslustjórin.

Strandferðslan fer fyrsta dagin at lýsa, hvussu ferðaætlanin verður ímillum Suðuroynna og Havnina ímeðan Smyril er á beding.



*–Vónandi fara fólk eisini at laga seg til tær broyttu umstøðurnar á suðuroyarleiðini, sigur Reidar Nónfjall*




